# Taka av oljuavgjaldi› í stigum


*Marjus Dam úr Sambandsflokkinum hevur skoti› upp at lækka brennioljuavgjaldi› í stigum, til ta› fellur burtur 1. januar 2002*

*Sambandsflokkurin leg›i í seinastu tingsetu fram uppskot um at taka av brennioljuavgjald i› í einum. Nú skal ta› fyrst ni›ur 40 prosent og komandi ár 30 prosent. 1. januar 2002 skal ta› fella burtur*

ÓLAVUR Í BEITI

Í vi›merkingunum til uppskot Sambandsfloksins um brennioljuavgjaldi›, sigur Marjus Dam, at Sambandsfloksins hugsan er, at ta› er ein ney›ugur og uppiborin lætti, hvørt einasta húski, borgari og arbei›spláss fær vi› samtykt av hesum uppskoti. Um mi›aln‡tslan hjá húskinum av olju er 4000 litrar um ári›, ver›ur lættin hjá mi›alhúskinum 480 kr. seinastu 3 mána›irnar í ár. Ár 2001 fellur gjaldi› frá 3.200 kr ídag til 960 kr um ári›. Í ár 2002 fellur oljuavgjaldi› burtur eftir hesum uppskoti›.

Og sambært uppskotinum, lækkar oljuavgjaldi› vi› 40% í ár. Sí›an ver›ur ta› aftur lækka› vi› 30% í ár 2001. Sí›stu 30% fella burtur pr. 1 januar ár 2002, og ver›ur lógin um brennioljuavgjaldi› tá tikin av.

**Spekulasjón**

– Sum stø›an er hjá landskassanum, er møguleiki at lætta um hjá føroyinginum vi› at taka av oljuavgjaldi›. Ta› fer at bøta um trivna›in í einstaka heiminum, eins og ta› fer at lætta um hjá mongum arbei›splássi, i› ikki fær oljuavgjaldi› endurrinda›.

– Sambært hesi lóg eru ta› nærum bara privat og smávirkir, i› gjalda oljuavgjald. Allur annar ídna›ur og virkir fáa oljuavgjaldi› endurgoldi›. Eftir okkara tykki vil hetta uppskoti› beina burtur hendan skeivleikan, i› væl skiljandi kann skunda undir spekulasjón á økinum.

Sambært uppskotinum hevur Toll og Skatt uppl‡st, at nettoinntøkan av oljuavgjaldinum er 60 milliónir um ári›, ella 5 milliónir pr. mána›.

– Ta› hevur sera stóran t‡dning fyri Sambandsflokkin, at borgarin sleppur lættari, vi› at oljuavgjaldi› fellur burtur. Vit í Sambandsflokkinum vóna, at løgtingsmenn arbei›a saman í hesum máli, so ta› gerst meira liviligt hjá vanliga føroyinginum. Vit vóna tí, at uppskoti› ver›ur samtykt, sigur Marjus Dam í vi›merkingunum.

Eftir 1. vi›ger› er uppskoti› beint í fíggjarnevndina.

# Fjór›a ári› á ra› uttan skúlalækna

*Eingin umbering kann rættvísgera, at 40 prosent av Føroya børnum ikki hava ta trygd, sum ein reglulig kanning hjá skúlalækna gevur, sigur Jenis av Rana í vi›merkingunum til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Jenis av Rana hevur spurt almanna- og heilsumálará›harran, hví børnini í Su›urstreymi fjór›a ári› á ra› eru uttan skúlalækna?

Í vi›merkingunum, sigur Jenis av Rana, at umlei› 40% av landsins skúlabørnum búgva í Su›urstreymi. Tá hesi í 1994 fingu skúlalækna, var› ta› eftir 4 ár uttan slíkan, og eftir at fleiri landsst‡ri, vi› einari undanfør›slu fyri og a›rari eftir, høvdu víst frá sær at søkja eftir slíkum. Bara eftir áhaldandi áheitanum og tr‡sti frá m.ø. b‡rá›num, har undirrita›i leg›i uppskot fram vi› áheitan á landsst‡ri› um at søkja, søkti landsst‡ri›. Úrslit var› beinanvegin, umsóknir komu, og lækni var› settur.

– Eftir 3 ár í skúlalæknastarvinum gavst hesin og sí›ani tá hevur, eins og fyrst í 90'árunum, ein landsst‡risma›ur fyri og annar eftir brúkt allar hugsandi umberingar fyri ikki at veita børnunum hesa fyribyrgjandi og lívsney›ugu hjálpina. Seinastu fer›ir undirrita›i her á Løgtingi hevur spurt, hevur læknafelagi› veri› n‡tt sum undanfør›sla - eingin sáttmáli sigst vera orsøkin.

– Hetta ábyrgdarloysi má fáa ein enda - beinanvegin! sigur Jenis av Rana.

**Kenna sína ábyrgd**

Og ví›ari sigur løgtingsma›urin, at hægsti politiski myndugleikin má vera sína uppgávu vaksin og kenna sína ábyrgd. Skúlalæknaarbei›i› kann ikki yvirmetast, ta› er fremsta fyribyrgingartiltak fyri heilsu skúlabarnanna. Ta› hvílir tí ein álvarslig ábyrgd á einum landsst‡ri, sum ikki røkir og prioriterar hesa uppgávuna millum tær fremstu.

– Eingin umbering kann rættvísgera, at 40% av Føroya børnum ikki hava ta trygd, sum ein reglulig kanning hjá skúlalækna gevur, og sum onnur framkomin lond síggja sum fremstu almennu skyldu. Tí eigur landsst‡ri beinanvegin at seta l‡sing í blø›ini eftir skúlalækna, og eg loyvi mær at ivast í, at naka› læknafelag fer at for›a fyri at loysa tey ivamál, sum annars kundu ver›i› brúkt sum grundarlag undir framtí›ar umberingum, sigur Jenis av Rana í vi›merkingunum.


*Jenis av Rana hevur spurt landsst‡rismannin í almanna- og heilsumálum, hví børnini í Su›urstreymi fjór›a ári› á ra› eru uttan skúlalækna?*

# Oljuavgjaldi› ni›ur á fimti oyru


*Vilhelm Johannesen hevur skoti› upp at lækka brennioljuavgjaldi› úr 80 oyrum fyri liturin ni›u í 50 oyru fyri liturin*

*Mána›arliga útgjaldi› frá Samhaldsfasta til pensjonistar, sum í løtuni er 594 krónur, hev›i komi› upp á 1.260 krónur um mána›in, um uppskot Javna›arfloksins ver›ur samtykt*

ÓLAVUR Í BEITI

Uppksot Javna›arfloksins, sum Vilhelm Johannesen leg›i fram í farnu viku, er nú fari› í Fíggjarmevndina til vi›ger›ar. Vilhelm Johannesen hevur skoti› upp at seta oljuavgjaldi› úr 80 oyrum ni›ur í 50 oyru og at oljuavgjaldi› skal í Samhaldsfasta, so pensjonistarnir fáa meiri enn ta› dupulta úr grunninum mána›arliga.

Í vi›merkingunum til uppskoti›, sigur Vilhelm Johannesen, at seinastu tí›ina er markna›arprísurin á olju stø›ugt hækka›ur. Í farnu viku bar útvarpi› tey tí›indi, at um gamla skipanin vi›víkjandi avgjaldi á brenniolju, hareftir avgjaldi› var› regulera› upp og ni›ur, alt eftir um markna›arprísurin á olju var høgur ella lágur, framvegis hev›i veri› í gildi, so hev›i oljuprísurin veri› 22 oyru lægri, enn hann í veruleikanum er.

Javna›arflokkurin heldur tí, at avgjaldi› á brenniolju er heilt órímiliga høgt, og mælir vi› hesum uppskotinum til, at fasta avgjaldi› ver›ur lækka› úr 80 oyrum fyri liturin ni›ur í 50 oyru fyri liturin.

**Risastórt avlop**

Og ví›ari sigur Vilhelm Johannesen, at tann 31. august 2000 hev›i landskassin fingi› kr. 45.545.165 inn, sum stava beinlei›is frá avgjaldi á brenniolju sambært galdandi lóg. Um hetta tal ver›ur framrokna› til árskifti›, ver›ur samla›a inntøkan sambært lógini gó›ar 70 mió krónur. Harav fara útaftur gó›ar 10 mió. krónur til afturrindan sambært reglunum um afturrindan av avgjaldinum til fiskiskip og a›ra vinnu.

– Um uppskot Javna›arfloksins ver›ur samtykt, kemur hendan inntøkumetingin sjálvandi ikki at halda, men hinvegin ver›ur rokna› vi› risastórum avlopi á fíggjarlógini fyri 2000 – einum avlopi, sum eftir øllum at døma fer at ver›a munandi hægri, enn rokna› var› vi›, tá fíggjarlógin fyri verandi fíggjarár var› samtykt. Avlei›ingin av, at hetta uppskoti› ver›ur samtykt, ver›ur tí, at risastóra avlopi› hjá landskassanum í hesum fíggjarárinum ver›ur naka› minni. Lutfalsliga er talan bara um eina sera lítla upphædd.

**30 oyru ni›ur**

Í fjør mælti Javna›arflokkurin til, at avgjaldi› í framtí›ini skuldi fara í Samhaldsfasta.

– Javna›arflokkurin hevur rokna› út, at ver›ur oljuavgjaldi› sett til 50 oyru fyri liturin, gevur hetta 50 mió. kr. um ári›. Um vit so ganga út frá, at Samhaldsfasti rindar tey 90 prosentini av hesi inntøkuni út aftur til pensjónistarnar, so svarar útgaldi› av hesum til 45 mió. kr. Tali› av móttakarum er 5.500. Árliga vildi hetta givi› tí einstaka fólkapensjónistinum gó›ar 8.000 kr. afturat.

– Mána›arliga útgjaldi›, sum í løtuni er kr. 594,00, ver›ur vi› hesum økt vi› kr. 666,00 solei›is, at ta› kemur upp á kr. 1.260,00 um mána›in. Samstundis lækkar oljuprísurin hjá pensjónistum - og øllum ø›rum - vi› 30 oyrum fyri liturin, ta› merkir, at 1000 litrar av olju gerast heilar 300 krónur bíligari, sigur Vilhelm Johannesen m.a. í vi›merkingunum til uppskoti›.



# Álvaskot í Fuglafirði

*Mikudagin letur upp nýggj fysioterapiviðgerðarstova í Fuglafirði. Tað er Álvur Hansen, sum stendur aftanfyri nýggju stovuna*

STEFAN Í SKORINI

Fuglfirðingurin Álvur Hansen hevur seinastu tvey árini arbeitt við at lata eina slíka stovu upp í heimbygdini. Nústaðni eru ætlanir hansara vorðnar veruleiki, og mikudagin kunnu fólk støkka inn á gólvið fyri at síggja nýggju hølini og heilsa uppá eigaran og einasta starvsfólkið í Álvaskoti, Álv Hansen. Móttøkan verður mikudagin millum klokkan 15 og 17.

Hann hevur arbeitt á Klaksvíkar Sjúkrahúsi síðan 1996, tá hann varð útbúgvin fysioterapeut. Nú er hann so farin at arbeiða fyri seg sjálvan. Álvur sigur, at hann hevur leingi havt hug at byrja fyri seg sjálvan, men ikki hevur verið møguligt at lata stovuna upp fyrr enn nú.

- Eg havi leingi havt hug at byrja eina viðgerðarstovu, og eg meti, at tað er tørvur á eini slíkari stovu í Eysturoynni, sigur Álvur, og hann leggur afturat, at tað er møguleiki fyri at stovan kann bera seg.

Frammanundan er bara ein slík stova í Eysturoynni, og hon er í heilsumiðstøðini í Runavík.

Álvaskot er ein privat viðgerðarstova, sum Álvur Hansen sjálvur eigur og rekur.

Ætlanin er ikki at leggja seg eftir einum ávísum bólki, men at taka allar kundar við ymsum brekum.

Álvur Hansen sigur, at arbeitt verður mest eftir læknaávísing, har ein lækni vísir til fysioterapeut. Í slíkum førum verður helvtin goldin av sjúkrakassanum. Annars kann tað vera ov dýrt hjá fólki at ganga til fysioterapi, um ein partur ikki verður goldin av sjúkrakassanum.

Fakfelagið hjá fysioterapeutunum hevur ein sáttmála við sjúkrakassarnar, sum Álvur hevur søkt um at sleppa við í. Tað er ikki heilt frítt at lata slíka stovu upp, og ikki fyrr enn loyvið er fingið, er hesin møguleikin opin. Álvur hevur júst nú fingið loyvi at virka undir hesum sáttmála og kann tískil fara undir egna viðgerðarstovu.

**ÁLVaskot**

Álvur Hansen er væl nøgdur við hølini, hann hevur fingið. Tey liggja væl fyri miðskeiðis í bygdini. Tað var annars ikki so lætt at finna eini hóskandi høli í Fuglafirði. Handilslívið er í vøkstri, og tí var torførari at finna høli. Álvaskot er nú í sama bygningi, sum telducafein Vega og Toy- og Tógvhandilin eisini húsast.

Navnið Álvaskot hevur Álvur sjálvur funnið fram til. Hann hevur verið í samband við Føroyamálsdeildina, har hann fekk fleiri góð uppskot. Hann kom tó sjálvur fram til tað best hóskandi navnið.

Álvaskot merkir tað sama sum millum mannað verður kallað hald í rygginum, heksaskot ella lumbago. Í bókini »Gomul Føroysk Heimaráð« eftir fyrrverandi eiðislækna R.K. Rasmussen, sum Føroya Fróðskaparfelag gav út í 1959, stendur um orðið álvaskot:

– Álvaskot er tað sum á donskum eitur hekseskud. Hetta orðið leiðir hugan á pátrúgv hjá teimum gomlu um, at sjúkan var elvd av álvum, stendur at lesa í bókini.

Tað er eitt stuttligt, at maðurin aftanfyri viðgerðarstovuna eitur Álvur.

# Ungdómsstevna í Klaksvík

*Heima Missións Ungdómur setir í heystfrítíðini øllum ungdómum stevnu í Klaksvík, har bíbliuundirvísing og tónleikur fara at seta sín dám á stevnuna*

STEFAN Í SKORINI

Nógv ymiskt verður á skránni, teir dagarnar stevnan verður. Umframt bíbliutímar verður eisini nógvur tónleikur at hoyra. Tíggju ymiskir bólkar fara at spæla og syngja á stevnuni. Nevnast kann Vox, sum var við á Gospelfestivalinum í Norðurlandahúsinum í fjør.

Trúðboðarar hjá Heimamissiónini fara at hava bíbliuundirvísingina. Til ber hjá luttakarunum at velja seg inn á teir tímarnar, sum síggja mest áhugaverdir út.

Umframt vanligu undirvísingina verður eisini serlig undirvísing fyri gentur og dreingir. Í „Gentukrókinum“ verður tosað um ymisk evni, sum eru viðkomandi fyri gentur. Um gleði og ótta, kenslir og sjálvsvirðing. Hesin tími er bara ætlaður gentum, og tí hava dreingir og foreldur onga atgongd. Á sama hátt verður eisini ein áhugatími fyri dreingir, sum kallast „Dreingjahornið“. Umframt alt hetta verða eisini nógv frítíðartiltøk á skránni.

Nógv hava longu teknað seg, og tí ræður um at bera skjótt at fyri at fáa pláss á teimum tímunum, sum hava størst áhuga. Eini 100 hava longu boðað frá luttøku.

Heima Missións Ungdómur skipaði fyri líknandi tiltaki fyri tveimum árum síðani, og tá vóru 350 ungdómar savnaðir á Giljanesi.

HMU hevur roynt at kunna um tiltakið á ymiskan hátt, og í løtuni ferðast Jan E. Petersen, sum er nýggjur hjálpartrúboðari, runt til allar skúlar í landinum við faldarum.

Landsungdómsstevnan, sum vanliga er nevnd LUS, er fyri øll ung úr 7. flokki og uppeftir.

# Mentamálaráðharrin tilnevnir allar limirnar

*Mentanargrunnur Landsins verður stjórnaður av nevnd við 5 limum, sum landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum tilnevnir. Tveir av nevndarlimunum og tveir av varalimunum skulu tilnevnast eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya*

ÓLAVUR Í BEITI

Nú er so kunngerðin um Mentanargrunnur Landsins komin og smb. kunngerðini kann Mentanargrunnur Landsins eftir umsókn stuðla bóka- og fløguútgávur upp til 30% av útgávukostnaðinum.

Smb. kunngerðiniu verður Mentanargrunnur Landsins stjórnaður av nevnd við 5 limum, sum landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum tilnevnir. Landsstýrismaðurin tilnevnir 5 varalimir. Tveir av nevndarlimunum og tveir av varalimunum skulu tilnevnast eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya.

Nevndin umsitur sjálvstøðugt játtanina á fíggjarløgtingslógini og aðrar inntøkur.

**Starvsløn**

Viðvíkjandi starvsløn, so er endamálið við starvslønunum at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listarligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.

Starvslønir kunnu verða latnar soleiðis: 1 starvsløn galdandi í 3 ár, 2 starvslønir galdandi í 1 ár umframt starvslønir galdandi í 1 til 6 mánaðar. Starvslønin um mánaðin svarar í upphædd til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1. Nevndin ger sjálv av, hvussu nógvar starvslønir verða latnar, tó skal samlaða útreiðslan til starvslønir fyri eitt játtanarár ikki verða meira enn helmingurin av samlaðu játtanini til Mentanargrunn Landsins.

**Íverksetanarstuðul**

Viðvíkjandi Íverksetanarstuðul, so sigur kunngerðin, at endamálið við íverksetanarstuðlinum er at stuðla einstaka skapandi yrkislistafólkinum, serliga ungum listafólki. Íverksetanarstuðulin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum at koma víðari við teirra skapandi listararbeiði.

Íverksetanarstuðul er á kr. 75.000,- árliga, og verður upphæddin árliga lagað til sambært prístalinum hjá Fíggjarmálastýrinum. Íverksetanarstuðul kann bert latast sama persóni eina ferð og í mesta lagi fyri tvey ár.

Viðvíkjandi stuðli til ymiskar verkætlanir og stuðul til vanligt men-tanarligt virksemi sum heild, sigur kunngerðin, at hesin verður latin eftir umsókn til Mentanargrunn Landsins.


MARKO´2000
SØLUSTEVNAN

Verður í ítróttarhøllini í Runavík 29. sept - 01. okt.

Luttakarar:
Skósølan Gøtugjógv, P/F Jógvan Weihe, Curri, Flísan, Sp/f Sirri, MB Tours, Sp/f Inventartænastan, Profa, Benetton, Hon & Hann, Klæmint Petersen, Tutl, Millenium, Máling og Gólv, Shop Inn, Brøður Petersen, Húðrøkt v/Jørnu, Feðgar, ABS Transport, AD-Import, Súkkluhandilin í Líðini, Esmar Simonsen, JH Møblar, Com-Data, AWI Boats, Barnaútgerð, OilWind, Sp/f Hógv, Frú S

Undirhald
Eivør Pálsdóttir
Sámal Ravnsfjall
Niels Midjord
Vísumenn úr Klaksvík
Rúna á Heygum
Ronnie Poulsen
Magni Christiansen

Magni Poulsen er frásøgumaður í samband við mótasýningarnar

http://www.geocities.com/marko2000fo/
Marko Skrivstovan, Post Boks 172, FO-620 Runavík, Føroyar
Tel 22 22 50, Tel 22 22 51 Fax +298 44 95 35, e-mail: rogvi-la@post.olivant.fo

SANSIR · TEL 355355